Facelift til BMW 500

BMW 500 rø›in hevur fingi› n‡tt kølaragittar, n‡ggjar for og baklyktir, umframt a›rar smærri broytingar.

Kelda: BMW Magasin

Mazda Tribute

Á altjó›a bilaframs‡ningini á Bella Centrinum var ein n‡ggjur Mazda Tribute jeepur, sum kemur til Danmarkar næsta ár.

Kelda: Motor Magasinet

MR-Wagon

Suzuku vísti ein n‡ggjan MR-Wagon, i› møguliga ver›ur ein útgáva av tí vælumtókta Suzuki Wagon R.

Kelda: Motor Magasinet

Framkomin Volvo dieselmotorur

BILAR
Magnus Gunnarsson

Næsta ár kemur Volvo Car Corporation vi› einum n‡ggjum dieselmotori til Volvo S60, V70 og S80. Talan er um ein lættan 5 syl. 2,4 litur motor, sum Volvo Cars hava konstruera›, og ver›ur hann gjørdur á egnari motorverksmi›ju í Svøríki.

Næsta ár fær Volvo S60 eisini 2,4 l dieselmotorin hjá Volvo Cars

Aluminiumsmotorur

Hesin n‡ggi 5 syl. common rail dieselmotorinum, kemur ísta›in fyri Volkswagen dieselmotorin, sum Volvo hevur koyrt vi› higartil. Motorurin, i› er gjørdur úr aluminium, hevur 163 hk. brúkar 9,9 sek. at koma frá 0 til km/t. Um motorurin til dømis er í einum Volvo S80, ver›ur oljun‡tslan 15,6 km/l.

Tekniskir fyrimunir

Vi› ta› at motorurin hevur common rail tøkni, ver›ur brennievni deilt millum allar sylindararnar vi› høgum tr‡sti, gjøgnum eitt felags rør. Teir teknisku fyrimunirnir eru at brennitilgongdin ver›ur st‡rd heilt neyvt, og gevur ta› gó›a kraft, minni oljun‡tslu, minni larm og betri komfort.

Kelda: Volvo Personvogne Danmark A/S

GM og Fiat umhugsa at keypa Daewoo

BILAR
Magnus Gunnarsson

Herfyri frættu vit gjøgnum fjølmi›larnar, at Daewoo fyritøkan í Korea var farin á húsagang. Hetta er ikki heilt rætt, tí sannleikin er, at Daewoo er farin í gjaldste›g, fyri at framskunda eina umlegging av fyritøkuni.

Umlegging av Deawoo

Í einum tí›indaskrivi frá danska umbo›num, Daewoo Danmark/Dankor Autoimport A/S, ver›ur sagt, at núverandi stø›an onga ávirkan hevur á teirra virksemi. Nevndarforma›urin, Anders Bruun, hevur javnan samband vi› útflutningsst‡ri› í Korea, har sagt ver›ur, at gjaldste›gurin er settur í gongd fyri at framskunda tilgongdina vi› at finna ta røttu loysnina, so teir munadygt og skjótt kunnu fremja eina umlegging av Daewoo. Hetta ver›ur vátta› av tí›indafólkum, sum hava innlit í stø›una.

Alt sum higartil

Íkomna stø›an er eitt úrslit av einum valdstrí›i millum kreditorar og yrkisfeløgini í Korea, sum ikki hava víst nóg gó›an samarbei›svilja í umleggingartilgongdini. Ta› at General Motors saman vi› Fiat hava áhuga í at keypa Daewoo, hevur veri› vi›virkandi til gjaldste›gin. Bilaframlei›slan heldur áfram sum vanligt og fleiri n‡ggj modell av Daewoo eru ávegis til Danmarkar vi› skipi. Hjá Daewoo umbo›num í Føroyum, P/F Esmar Simonsen, ver›a ongar broytingar og bilasølan heldur áfram sum higartil.

Kelda: Daewoo Danmart / Dankor Autoimport A/S

Nevndarforma›urin í Daewoo Danamark, Anders Bruun, er her á bilaframs‡ningini á Bella Centrinum vi› einum n‡ggjum vi› einum n‡ggjum Daewoo Tacuma.



Fyrstu fer› at bilar vór›u framleiddir á samlibandi var 7 oktober í 1913. Undirvognarnir til Ford T komu út á veghæddini, me›an ovaru partarnir komu av a›ru hædd

Henry Ford (1863-1947) var ein sermerktur persónur, i› lat eina risastóra fyritøku eftir seg, og fekk av álvara gongd á bilaframlei›sluna í Amerika og restini av heiminum

Henry Ford – bóndasonurin sum fekk allan heimin á rull

BILAR
Magnus Gunnarsson

Ford Motor Company, i› er ein av heimsins størstu ídna›arfyritøkum, var› stovna› av Henry Ford í 1903. Hann bleiv heimskendur fyri hugskot sítt um at gera bíligar og slitsterkar bilar, eins og hann var tann fyrsti í bilídna›inum, sum gjørdi bilar á samlibandi.

Henry Ford

Henry F. Ford var› føddur í 1863. Hann var bóndasonur, men hugur hansara stó› meira til mekanik enn jar›arbrúk. Sum ungur arbeiddi hann eina tí› hjá Edison Illuminating Co. í Detroit, har hann bleiv vinma›ur vi› stovnaran av fyritøkuni, heimskenda uppfinnaran Thomas A. Edison (1847-1931). Tá tey motordrivnu akførini komu fram, fekk Henry Ford beinanvegin stóran áhuga fyri teimum, og longu í 1888 gjørdi hann royndir vi› bensinmotorum á sínum egna lítla verksta›i. Í 1896 gjørdi hann sína fyrstu roynd at gera ein bil vi› súkkluhjólum og 2 cyl. motori.

Hetta er ikki ein kassabilur ella ein rullistólur til tvey, men fyrsti bilur sum Henry Ford læt gera í 1896. Her eru Henry og Clara Ford farin ein túr vi› bilinum, fyri at minna seg á gamlar dagar

Ford T

Ford Motor Company var stovna› 16. juni 1903. Fyrstu bilarnir vóru Ford A, sí›an kom Ford B. Í 1905 kom model K vi› 6 syl. motori. Ársframlei›slan í 1906 var næstan 9000 bilar.

Henry Ford og hansara fólk gjørdu í 1907 klárt til Ford T, sum skuldi ver›a ein »bilur til fólki›« og seljast um allan heimin, Ney›ugt var tí, at bilurin skuldi vera slitsterkur, einfalt bygdur og lættur at vi›líkahalda. At bilurin fekk planetgear var ein sjálvfylgja tá, har pedalin til vinstru var ein kobling at skifta millum fyrsta og anna› gear, tann í mi›juni var at bakka vi› og til høgru var bremsan. Framlei›slan byrja›i í desember 1908. Ta›, sum gjørdi Ford T so kendan var, at bilurin var framleiddur so leingi og í so stórum nøgdum. Íalt vór›u framleiddir yvir 15 milliónir bilar fram til 1927. Frá 1913 var› framlei›slan av Ford T flutt yvir á samliband. Hetta hev›i vi› sær, at arbei›i› gekk so skjótt, at bilarnir kundu seljast til sera kappingarførar prísir.

Verksmi›jur handan hav

Handan hav komu bilverksmi›jur í einum landi fyri og ø›rum eftir. Tann fyrsta kom í Manchester í 1911. Eisini í Danmark komu verksmi›jur, sum settu Ford bilar saman í 1919. Sí›st í 20-árunum fór Ford at gera V-8 motorar til vanligar smærri bilar. Ford Motor Co. vaks til eina risastóra fyritøku. Í 1917 byrjar framlei›slan av lastvognum og Fordson traktorum. Frá 1932 av framleiddu Ford verksmi›jurnar í Onglandi síni egnu Ford modell, og tær t‡sku Ford verksmi›jurnar í Køln fóru eisini at framlei›a sínar egnu Ford bilar.

Samstundis sum Henry Ford var í móti kríggi, var hann ein fø›ilandsvinur um ein háls. Hann vildi verja land sítt og Ford bleiv ein stór leverandørur av herna›arútger› undir fyrra heimsbardaga.

Abbasonurin tekur yvir

Tann 26 mai í 1943 doyr Edsel B. Ford, einasti sonur Henry Ford, 50 ára gamal. Edsel hev›i veri› stjóri í fyritøkuni sí›an 1919 og hev›i sera gott skil fyri, hvussu Ford bilarnir skuldu síggja út. Í 1944, tann 23 januar, tekur Henry Ford ll, sonur Edsel, abbasonur Henry Ford, vi› sum lei›ari í Ford Motor Company.

Henry Ford doyr tann 1. apríl 1947, 83 ára gamal. Ein sermerktur persónur, i› læt eina risastóra fyritøku eftir seg og fekk av álvara gongd á bilaframlei›sluna í Amerika og restini av heiminum. Ein tri›ing av inntøku síni gav hann til vælgerandi endamál.

Einafer› Henry Ford bleiv spurdur um, hvat hann helt vera størsti vansin vi› at vera ríkur, svara›i hann, at ta› var at konan var givin vi› at matgera sjálv.

Ford hevur ment seg til eina alheims fyritøku. Amerikanska høvu›ssæti› er í Dearborn vi› Detroit. Fyritøkan er privat, og ovasta lei›slan hevur alla tí›ina veri› í Ford familjuni.

Ford T vór›u gjørdir í meira enn 15 milliónum eindum frá 1908 til 1927. Filmsídna›urin gjørdi eisini sítt til, at Ford bilarnir vór›u so nógv seldir, sum til dømis tá Gøg og Gokke vístu hvat ein Ford T eisini kundi brúkast til. Í ár bleiv Ford T valdur til aldarinnar bil.